## Aftur fleiri føroyingar enn nakrantíð

1. mai vóru 48.869 føroyingar. Hetta eru 118 fleiri enn 31. desembur 2008. Fólkatalið 1. mai 2009 var 48.869, ið er stórsta talið av fólki í Føroyum nakrantíð. Gongdin í fólkatalinum í 2008 og fyrstu fýra mánaðirnar av 2009 vísir ein vøkstur ið byggir á burðaravlop og størri tilflyting enn fráflyting, undantikið august mánaða ið altíð er tann stóri fráflytingar mánaðin, tá tey flestu við útbúgvingarørindum flyta av landinum Fólkatalið hevur annars verið vaksandi síðan kreppan í hálvfemsunum hasaði av, undantikið 2005 tá ein minking var í fólkatalinum. - Nú fíggjarkreppan ger um seg og arbeiðsloysið er vaksandi kann tað undra, at fólkatalið er vaksandi. Higartil hevur fráflytingarmynstri frá kreppuni í hálvfemsunum ikki endurtikið seg og hvat verður kann bert framtíðin vísa, skrivar Hagstovan á heimasíðuni.



# Kvinna blivin burtur við Føroyar

**Í gjár varð uppdagað, at ein tailendsk kvinna, sum sigldi við ferðamannaskipinum Braemar var blivin burtur onkustaðni millum Føroyar og Ísland. Klokkan 18 steðgaði leitingararbeiðið hjá MRCC**

BURTURBLIVIN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Leitingin eftir kvinnuni, sum var við Braemer er steðgað, tí ongin vón er at finna hana*

Tá ferðamannaskipið Braemar kom á Havnina úr Íslandi í gjár, legði manningin til merkis, at ein teirra ikki var at finna. Talan var um eina tailendska kvinnu, sum ikki var sædd síðan klokkan hálvgum tólv kvøldið fyri.

Løgreglan var skjót umborð á skipinum og kannaði málið, samstundis sum sjóbjargingarstøðin, MRCC, setti leiting í gongd.

Tyrla, Brimil og Lív fóru beinanvegin at leita, samstundis sum Halgafelli og Líðraberg fylgdu við, um teir nú sóu hana.

Leitiøkið var stórt. Av havnarvág og 100 fjórðingar ímóti Íslandi.

Brimil byrjaði vestanfyri Mykines og leitaði vestureftir til har Braemer var tá ið persónurin seinast var sæddur. Tyrlan byrjaði í Skopunarfirði og leitaði vestur á sama stað, har persónurin seinast var sæddur og Lív byrjaði í Nólsoyarfirði og síðani í Skopunarfirði, Hestfirði, Vágafirði og vestanfyri Sandoynna.

Men av tí at kvinnan bara var í vanligum klæðum – einum ljósabláum uniformi og einum myrkum dýnujakka – gjørdist møguleikin at finna hana á lívi minni og minni.

Leitingin helt fram til klokkan 18, tá avgjørt var at steðga leitingini. Tíggju tímar vóru farnir síðan skipið var við bryggju í Tórshavn og átjan tímar vóru farnir síðan persónurin var sæddur seinast.

- Tá vóru ongar vónir fyri at finna persónin á lívi. Av tí at leitiøkið er hundrað fjórðingar langt, er heldur ikki vónir um at finna persónin, skrivar MRCC í tíðindaskrivi.

Klokkan 16 fór Braemer avstað aftur úr Tórshavn á veg til Skotland.

# Tilbúgvinarstigið í Føroyum óbroytt

**Hóast WHO hevur lýst krímsjúkuna influensu A at vera heimsfarsótt, verður føroyska tilbúgvingin í fyrstu syftu ikki broytt**

INFLUENSA A
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Hóast fyrsti persónurin í Norðurlondum er deyður av nýkríminum, so er tilbúgvingarstigið óbroytt*

Tað boða landslæknin og heilsumálaráðið frá. Føroyskir og danskir heilsumyndugleikar fylgja tó gongdini neyvt í tráð við tilmælini frá WHO.

Heimsheilsustovnurin WHO broytti í gjár influensa A-støðuna til stig 6. Henda broyting fær í fyrstu syftu ikki týdning fyri donsku tilbúgvingina, og í Føroyum hava vit tikið avgerð um at hava somu støðu sum donsku heilsumyndugleikarnir.

Stig 6 merkir, at influensa A (H1N1) nú hevur ment seg til eina veruliga heimsfarsótt. Hetta merkir ein støða, har smittan breiðir seg frá fólki til fólk á fleiri kontinentum. Broytingin sigur bert nakað um útbreiðsluna av smittu og ikki nakað um, at sjúkan er vorðin meira álvarsom.

Hóast broytingina metir WHO, at influensastøðan ikki er meira enn moderat álvarsom. Sjúkueyðkennini og sjúkugongdin hjá teimum smittaðu eru lutfalsliga mild, og eru framvegis ikki meira álvarsom enn við eini vanligari vetrarinfluensu.

### Føroyska tilbúgvingin óbroytt

Heilsustýrið eins og aðrir heilsumyndugleikar í Danmark taka støðuna í álvarsemi og fylgja gongdini, eins og vit gera tað í Føroyum. Broytingin, ið WHO hevur gjørt, fær ikki danskar ella føroyskar heilsumyndugleikar at broyta tilbúgvingarstigið.

- Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at hóast tað er ein alheims influensaheimsfarsótt við smittu í nógvum londum, so merkir tað ikki, at tað í løtuni er ein farsótt við nógvum smittaðum í Danmark ella í Føroyum. Eingin smittaður er fráboðaður enn í Føroyum. Í Danmark er smittan framvegis avmarkað til fólk, ið hava verið uttanlands og í heilt einstøkum førum teirra nærmastu sambond, boða Heilsumálaráðið og Landslæknin frá.

Í tráð við tilmælini frá WHO fylgja danskir og føroyskir myndugleikar framvegis gongdini og royna at byrgja fyri smittu við at avbyrgja tey, ið verða smittaði og geva fyribyrgjandi viðgerð til nærmastu sambond.

### Ongar serligar atgerðir

Heilsustýrið í Danmark og Landslæknin meta ikki, at fólk í Danmark og Føroyum sum heild hava orsøk til ótta. Kemur ein heim uttanlanda úr øðrum londum enn Danmark og fær sjúkueyðkenni sum við influensa (knappliga íkomin sjúka við fepuri yvir 38 hitastig C, sjúkueyðkenni frá andaleið og pínu í vøddum), skal ein seta seg í samband við sín egna lækna ella læknavakt.

Á heimsstigi vóru hin 11. juni skrásett 27.737 smittaðir tilburðir og 141 deyð elvt av smittu.